

# Norska oljuvinnan má traðka á bremsuna

**Jan Müller**

03.04.2014 - 14:44

Oljan.fo

Við verandi kostnaðarstøði er norska oljuvinnan ikki burðardygg. Tað segði stjórin í Oljustýrinum, Bente Nyland, tá stýrið legði sína tilfeingismeting fram í dag.

- Í seinastuni hava orð sum rakstrarútreiðslur og kapitaldisiplinur merkt orðaskiftið í vinnuni. Júst tí er tað umráðandi at gera vart við og at minna á, at hendan vinnan vil fegin hava eitt langt lív. Sum tilfeingismyndugleiki hevur tað týdning fyri okkum, at ídnaðurin ikki sleppir sær undan sínum skyldum, arbeiðir fyri framtíðarinntøkum, men eisini, at hann heldur kapitaldisiplin, segði Bente Nyland á tíðindafundinum.

Eftir hennara tykki síggja vit nú endan á einari góðari og drúgvari uppgongutíð í norsku oljuvinnuni.

-Vit hava havt afturgongd fyrr og eru komin so dyggiliga afturíaftur, segði hon

**Mugu bremsa**

Benta Nyland kom við nøkrum ávarandi orðum til vinnuna.

-Nú noyðast vit at traðka á bremsuna. Verandi gongd er ikki burðardygg. Tað eru vit samd um, vinnan og myndugleikarnir, segði Bente Nyland og vísti á, at útreiðslurnar av at bora eru tvífaldaðar tey seinastu tíggju árini. Hon segði, at gongdin í útreiðslunum og avbjóðingin hjá lønseminum eru ikki sernorskir trupulleikar, og at teir tí fara at gera vart við seg, sama hvørji tiltøk verða sett í verk í Noregi.

Í dag eru 77 leiðir á norskum øki í rakstri, og av teimum eru 13 undir útbygging. Harafturat eru 88 fund, sum ætlanir eru um at útbyggja.

Í Oljustýrinum meta tey, at tey næstu tíggju árini fer tað kenda oljutilfeingið at økjast umleið 1.200 milliónir rúmmetrar. Tað samlaða tilfeingið er mett til 14,2 milliardir rúmmetrar. Av hesum eru umleið 60 prosent kendum leiðum og fundum. Hitt er ikki funnið enn.